gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

## Cadillac til Busch



Amerikanski forsetin, George W. Busch, hevur fingið ein nýggjan Cadillac De Ville Limosine árg. 2001, við skottryggum rútum og karossarii, innbygdari skrivstovu og Night Vision skipan, við infra-reyðum ljósum, ið síggja alt sum rørir seg nærhendis bilinum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Toyota Matrix



Toyota Matrix, sum var á bilaframsýningini í Detroit, verður gjørdur í samstarvi við GM. Bilurin er bygdur yvir ein Corolla plattform, eins og Pontiac Vibe, ið báðir koma á marknaðin næsta ár.

*Kelda: FDM / Motor*

## Chrysler uppsagnir



Vegna stórar sparingar hjá Chrysler Group í USA, hava DaimlerChrysler ætlanir um at lata 6 verksmiðjur aftur í 2002, og siga 26.000 starvsfólkum upp tey næstu trý árini. Hetta eru 20 prosent av samlaðu arbeiðsmegini.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Renault keypt meira enn triðingin av Nissan



*Nissan stjórin, Carlos Ghosn, hevur gjørt bilídnaðin í heiminum ovfarnan við at vísa, at hann fekk Nissan at geva yvirskot meira enn eitt ár skjótari enn væntað*

**Hóast Renault og Volvo persónbilarnir um okkara leiðir verða seldir av sama søluumboði, er tað Renault og Nissan, ið hava meiri samstarv enn tey flestu geva sær far um. Um nøkur ár koma Renault og Nissan at hava felags plattformar, men á marknaðinum skulu teir kappast ímóti hvørjum øðrum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

**Uppsagnir í Japan**
Tá franska Renault bilverksmiðjan í 1999 keypti 37 prosent av japansku Nissan bilverksmiðjuni, settu teir sín mann, Carlos Ghosn, til at stýra japansku Nissan fyritøkuni. Hetta bleiv ein sonn kolvelting á elstu bilverksmiðjuni í Japan, har ikki færri enn 21.000 starvsfólk fingu at vita, at tey máttu finna sær annað arbeiði. Nissan hevði tá í fleiri ár givið stórt undirskot og Carlos Ghosn lovaði, at longu í 2001 skuldi hann venda gongdini til eitt yvirskot. Tey, sum kendu mannin, ivaðust ikki í at hann fór at klára tað, men yvirskotið kom eitt ár fyrr enn tey mest bjartskygdu høvdu væntað.

**Felags plattformar**
Enn er ikki talan um nakra samanlegging, men um tvær sjálvstøðugar fyritøkur, har Renault stjórnar Nissan. Sum frá líður verður roknað við, at fyritøkurnar verða lagdar saman, tó verða Renault og Nissan tvey sjálvstøðug bilmerkir, sum koma at kappast á sama hátt sum tey gera í dag. Sambært tíðindum sum Carlos Ghosn er komin við til fronsku fjølmiðlarnar, er ætlanin at teir í 2010 skulu hava felags plattformar, so vit kunnu rokna við at Nissan verða gjørdir á Renault verksmiðjum og Renault á Nissan verksmiðjum.

*Kelda: Motor Magasinet*




*Renault og Nissan fara at hava nógv samstarv í framtíðini*

# VW »Rugbreyðið« spøkir aftur

**Tær stóru altjóða bilaframsýningarnar eru ofta staðið, har nýggir konseptbilar verða sýndir fram fyri at vita, hvussu teir verða móttiknir av øðrum designarum, tíðindafólkum og hvat fólk annars halda um bilarnar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

**Møguliga framleiddur**
Volkswagen hava ofta okkurt spennandi nýtt á árligu bilaframsýningunum, sum eru í Detroit í januar mánaða. Hesaferð møttu teir upp við "VW Mikrobus", sum er ein nútímans útgáva av gamla "Rugbreyðinum" sum kom fram í 1950.

Innrættingin er rættuliga líðilig, soleiðis at stólarekkjurnar í miðjuni kunnu snarast 180 stig, so tey ferðandi kunnu venda ímóti hvørjum øðrum undir koyring. Um nýggja "Rugbreyðið" verður sett í framleiðslu, er ov tíðliga at siga nakað um enn. Eftir at VW Beetle fyrstu ferð varð sýndur fram í Detroit sum konseptbilur, gekk ikki long tíð til hann kom á marknaðin, so vit fáa at síggja.

*Kelda: FDM / Motor*



*Bilurin minnir ikki sørt um gamla »Rugbreyðið«, sum fyrstu ferð kom á marknaðin 8. mars í 1950*

gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

# Daewoo Tacuma

## – ein rúmligur 5 persóna MPV



*Tacuma er ein snøggur 5 persóna bilur fyri kappingarførar prísir*




*Framman sær Tacuma út sum ein eyðkendur Daewoo*

**Daewoo, sum er eitt lutfalsvís nýtt bilmerki um okkara leiðir, verða gjørdir í Suðurkorea. Tacuma er tann nýggjasti bilurin á skránni hjá Daewoo fyri Europa, har hann kemur at kappast við eitt nú Renault Scenic, sum teir eisini hava brúkt sum fyrimynd**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

**Gott brúksvirði**
Tacuma er ein væl innrættaður 5 persóna bilur, sum er gjørdur til nógv ymisk endamál. Innan virkar Tacuma sum ein stórur bilur við góðum brúksvirði, har man situr væl og høgt í setrunum, bæði framman og aftan. Framsetrini hava fleiri møguleikar til innstilling, og instrumentbrettið er væl skipað, lætt at avlesa og at handfara. Tey trý baksetrini kunnu møblerast um eftir ynski, ella takast úr bilinum, um tørvur skuldi verið á tí. Í CDX útgávuni kunnu bæði framsetrini snarast 180 stig, um tey, sum sita framman, í einum steðgi hava hug at venda sær á og práta við onnur í bilinum. Á stólaryggjunum á framsetrunum eru flúgvarasetur til tey ferðandi á baksetrunum.

**SX og CDX**
Hóast Tacuma er ein lutfalsliga høgur bilur, eru koyrieginleikarnir góðir, og bilurin livir upp til tað man kann vænta av einum nútímans bili í hesum klassanum, bæði hvat viðvíkur koyring í svingum, og í aðrar mátar. Tacuma fæst við tveimum motorstøddum, einum 1,8 litur við 98 hk, og einum 2,0 litur við 121 hk. Prísmunurin millum báðar útgávurnar er einans kr. 10.000,-. Lítil munur er á útgerðini á SX og CDX útgávunum.

**Væl útgjørdur**
Av standard útgerð kunnu vit m.a. nevna ABS bremsur við EBD, dupultar airbag, tokulyktir framman og aftan, el-rútar, el-spegl við varma, takstativ, sentrallás við fjarstýring, startsperru og el-frátøkustøð til eitt nú kuldaskáp. Daewoo geva 3 ár ella 100.000 km. mekaniskt garanti, 3 ára lakkgaranti og 6 ára garanti móti gjøgnumtering.

Daewoo er á veg frameftir við risalopum, og tá hugsað verður um hvussu nógv teir eru broyttir tey seinastu 10 árini, er her talan um eitt bilmerki, sum kappingarneytarnir mugu taka í fullum álvara. Serliga nú General Motors kemur at hava stóra ávirkan á Daewoo verksmiðjuna.





*Í CDX útgávuni kunnu bæði framsetrini snarast 180 stig*




### Daewoo Tacuma 2.0 CDX

| | |
|---|---|
| Motorurin | 2,0 litur 16V 121 hk |
| 0-100 km/t | 10,5 sek. |
| Bensinnýtsla | 11,1 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 435,0 cm |
| Breidd | 175,5 cm |
| Hædd | 158,0 cm |
| Eginvekt | 1467 kg |
| Totalvekt | 1862 kg |
| Viðførisrúm | 455 litrar |
| Prísur | kr. 179.700,- |
| Søluumboð | P/F Esmar Simonsen<br>Kambsdalur<br>FO-530 Fuglafjørður<br>Tlf. 444405 |